BLÁI STÓLURIN



# Eyðfinn Jensen, ljóðtøkningur, tónleikari, tónasmiður, 38 ár

# »Kærleiki gevur lívinum innihald«

Lýs teg sjálvan við trimum orðum:
**Opin, erligur og áhaldin.**

Hvat orð ella hvønn setning nýtir tú oftast?
**Fínar greiðir!**

Hvørjum hyggur tú at hjá hinum kyninum?
**Øllum tí, sum er sjarmerandi :-)**

Hvussu langa tíð nýtir tú at gera teg kláran um morgunin?
**15 min.**

Hvat stressar teg?
**Tað sum eg mangli at gera...**

Hvat gleðir teg?
**Mín familja fyrst og fremst, og annars tá eg røkki á mál við onkrum, sum eg seti mær fyri.**

Nær feldi tú seinast eitt tár?
**Tá sonur mín var føddur í juni, feldi eg fleiri gleðistár.**

Nær smakkaði tú tær seinast á?
**Seinasta leygarkvøld tá eg var til Planet Awards.**

Hvat var seinasta ynski, sum tú fekst uppfylt?
**At PoppKorn var kosin Ársins Nýggi Bólkur.**

Hvar arbeiðir tú?
**Í Útvarpinum.**

Hvørji ráð hevur tú til fólk, sum ætla sær at fáast við tónleik?
**At vera áhaldin og at fylgja egnum hjarta.**

Hvat er besta uppfinningin og hví?
**Kærleiki og alt tað sum hartil hoyrir. Tí tað gevur lívinum innihald og meining.**

Hvat hevur tú í lummunum beint nú?
**Billyklar, korthaldara og fartelefon.**

Hvat er títt besta heimaráð?
**Ger tað tú ger, so gott sum gjørligt er!**

Hvør er stuttligast í Føroyum og hví?
**Daman hjá mær Malan, tá hon er í hopla. Malan dugir m.a. at gera tær mest absurdu grimassurnar við andlitinum, so øll fara at flenna :-)**

Hvør er keðiligast í Føroyum og hví?
**Havi íbetur ikki møtt tí persóninum enn...**

**Hvussu ofta speglar tú tær?**
**Um morgunin og annars tá eg vaski mær.**

**Hvussu ofta ert tú hjá frisør?**
**Umleið 6. hvørja viku**

**Hvør er tín stuttligasta tónleikaupplivingar?**
**Tað er ringt at siga, tí eg havi havt sera nógvar ymiskar stuttligar tónleikaupplivingar, bæði í Føroyum, Danmark og Íslandi. Men tann fyrsta var, tá eg sum 12 ára gamal vann tónleikakappingina í SMS við bólki mínum, HolyStones, og tann seinasta var leygarkvøldið, tá dóttur mín og hennara vinkonur í PoppKorn vunnu heiðurin sum Besti Nýggi Bólkur 2006.**